**Blaðnevnd:**
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 316135/216135
Eirikur Lindenskov
tlf. 316409/216409
eirikur@sosialurin.fo

**Nevnd í Føroya Ellisakførum:**
Formaður:
Ingi Justinussen
tlf. 318055/217813
ingi@arb.fo
Næstformaður:
John William Old
tlf 311725/223243
jwtrukk@kallnet.fo
Skrivari: Rúni Nielsen
tlf.
Kassam.: Hans J. Nielsen
318385
Johan Beder
tlf. 288821 ella 444821

**Eykalimir:**
Júst Sivertsen, tlf. 310736
Helgi Magnusarson

**Kontaktpersónar:**
Norðoyggjar: Manni Waag Høgnesen, tlf. 456777
Eyturoy: Jóhan Beder,
tlf. 288821 ella 444821
Vágar: Hans Elmar Poulsen
tlf. 332411 ella 332877
Sandoy: Ásmundur Johannesen
tlf. 310207
Suðuroy: Mogens Petersen
tlf. 371466

**Hølisumsjón:**
Heini á Borg
311960/543061
hab@ssl.fo

**Hølið er opið:**
Mánakvøldið 20[00] til 22[00]
Tel/fax 318099
e-postur:
ellis@post.olivant.fo
Heimasíða:
www.ellisakfar.com
Bústaður:
Yviri við Strond 22

**Framleiðsla:**
Prenttilgerð: Sosialurin
Films- og plátugerð:
SP/F Hestprent
Prent: P/F Prentmiðstøðin
Skorið og heft:
SP/F Hestprent

**Brunnurin:**
Nevndin fyri Brunnin:
Heini á Borg, formaður
Brynjolvur Jensen, næstformaður
Eirikur Lindenskov, skrivari
Petur J. Johannessen, kassameistari
John William Old, nevndarlimur

Nevndin fyri Brunnin tekur støðu í hvørjum einstøkum føri til fyrispuringar um at hýsa ellisakførum. Sáttmáli verður skrivaður og gjaldsavtala gjørd frammanundan

Næsta blað kemur út í oktober. Evstamark fyri tilfari er 30. september

Upplag: 1.600 eintøk

## Bilurin er søga og mentan

Nógv høvi eru, har tú kanst hátíðarhalda bilasøguna so ella so. Í fjør fylti felag okkara 10 ár, og um sama mundið vóru liðin 80 ár síðani, at fyrsti bilurin kom til Føroya. Í junimánaði vóru 100 ár liðin síðani Ford Motor Company varð stovnað við tí navnframa Henry Ford á odda.

Nógvar mýtur eru um henda mann, ið var sagdur at vera maðurin handan uppfinningina av samlibandsframleiðsluni. Hóast tað er at taka í so rívan til at geva honum henda heiður, so var tað í øllum førum hann, ið var hin fyrsti at seta í gongd hópframleiðslu av bilum. Mál hansara var púra greitt: Hann vildi framleiða bilin til vanliga fólkið. Um tað eydnaðist, so hevði hann í øllum førum tryggjað sær inntøkugrundarlagið. – Og tað eydnaðist væl og virðiliga.

Samstundis sum Ford kundi hátíðarhalda hundrað ára dagin í junimánaði, vóru liðin 80 ár síðani, at fyrsti bilurin kom í Vágoynna. Tað var tann 4. juni í 1923, at henda stórhending fór fram í Miðvági. Bilurin, ein Ford T lastvognur, fekk seinni eyknevnið Lazarus.

Í føroyskum siðsøguligum bókmentum hevur bilurin ikki fingið stóra rúmd. Enn er eingin bók skrivað um bilin í Føroyum, og tí er tað bara at fegnast um, at felag okkara hevur sett skjótil á arbeiðið at geva út í bók føroysku bilasøguna.

Henry Ford skal hava sagt, at *»history is bunk«*. At søga er fjas. Um Ford var lítlilátin, ella hetta var av ringari samvitsku, tí hann sum ungur hevði víðgongd antisemitisk sjónarmið – og sum einasti amerikanari fekk tann ivasama heiður at verða nevndur í »Mein Kampf« hjá Hitleri, skulu vit ikki taka støðu til, men hann fór í øllum førum skeivur. Tað hevði hann helst viðgingið í dag, eins og hann viðgekk ræðuleikarnar í kjalarvørri Hitlers.

Fyri eitt felag sum okkara hevur søgan alstóran áhuga. Akførini í sær sjálvum eru søga, tey skulu vera í upprunastandi og harvið verða ein mynd av teirri tíðini, tey eru frá.

Vit hava ein dýrgrip í øllum teimum ellisakførum, bilum og súkklum, sum eru í landinum í dag. Hesi akfør umboða seinastu 88 árini av heimsins motoriseraðu nýtíðarsøgu. Men vit síggja ov lítið til tey á føroysku vegunum, og mugu vit tíverri staðfesta, at felag okkara hevur ligið á latu síðu, tá umræður at fylkja limir og akfør til stevnur og onnur tiltøk. Her ynskja vit eina broyting, so felag okkara kann liva upp til endamálið.

Nú vit eru farin inn í triðju øldina motoriseraðum akførum, kunnu vit bara staðfesta, at bilurin er søga og mentan, og at motorurin sum so hevur havt størri týdning, mentunarliga, búskaparliga og sosialt enn nakað annað. Tí siga vit, at bilurin er søga og mentan!

*Eirikur Lindenskov*

## Blaðið í nýggjum hami

**Bíligari og lættari framleiðsla, litir, meira pláss og breiðari úrval av tilfari eru orsøkir til, at blaðið nú er broytt**

*Eirikur Lindenskov*



*Blaðið verður nú prentað sum ávís í fýra litum, skorið og heft. Ætlanin er at gera blaðið breiðari og áhugaverdari. Umframt at limirnir fáa blaðið er ætlanin at fáa haldarar og at selja blaðið í leysasølu*

Blaðið, tygum nú sita við, er fyrsta royndin av broyttu útgávuni av blaðnum, sum higartil hevur borið heitið »Tíðindaskrivið Ellisakfør«.

Blaðið hevur, sum navnið sigur, borið tíðindi frá Føroya Ellisakførum.

Royndirnar seinastu 11 árini hava lært okkum, at tørvur er á einum slíkum blað, sum fevnir um áhugamálini hjá limunum í Føroya Ellisakførum, men sum eisini í størri mun tekur annað tilfar við.

Blaðið varð umrøtt á aðalflundinum hjá felagnum í vár. Blaðbólkurin kunnaði tá um ætlanirnar um at broyta blaðið soleiðis, at tað nú verður prentað sum ávís í fýralit prenti. Blaðbólkurin hevur valt hesa loysnina, tí hon er bæði bíligari og lættari at fáast við. Eisini fáa vit nú eitt blað í litum, sum bæði gagnar á lýsingarsíðuni og so gevur tað okkum møguleikan at prenta allar myndirnar í litum.

Tað er einki dulsmál, at vit ikki hava megnað nóg væl í seinastuni at fingið blaðið út til tíðina. Umberingarnar kunnu verða nógvar, men tær lata vit liggja. Vit kunnu tó staðfesta, at blaðið er komið út – stórt sæð – rættuliga regluliga øll árini, og hesum ætla vit at halda fram við. Vit hava í blaðnum hesaferð ásett evsta mark til næsta blað (sí kolofon), sum kemur út í oktober.

Fyri at gera blaði so gott sum tilber, er tað rættuliga týdningarmikið, at hvør einstakur limur eisini gevur sítt íkast. Hetta kann verða við at koma við uppskotum til blaðbólkin, skriva viðmerkingar, greiða frá túrum og vitjanum, sum hvør einstakur hevur havt, sum eisini kann hava áhuga hjá øðrum limum.

Blaðið hevur fyrr prentað áhugaverdar hugleiðingar og frásagnir m. a. hjá Meinhardt Arge, Hergeir Petersen, Ova Ritter, Thomas Michael Smith o. ø. við. Slíkir møguleikar eru nógv betri nú, tí plássið er betri, og vit hava fyri so vítt ongar avmarkingar í síðutali – so tað er bara at spíska blýantin, ella at tendra telduna!

Tey, ið hava áhuga fyri motorsúkklum hava eisini víst áhuga fyri blaðnum, og á aðalfundinum varð upplýst, at tey eru vælkomin við tilfari til blaðið, tí ætlanin er at gera blaðið breiðari, so tað fevnir um áhugan hjá øllum, fyrst og fremst fyri ellisakførum, men annars fyri akførum sum heild – tí er navnið eisini broytt til »Hjólið«, og var tað Jan Danielsen á Toftum, sum kom við uppskotinum á aðalfundinum.

Hetta blaðið er gørt í sambandi við ólavsøkuframsýningina, sum er í høllini hjá P/F Wenzel – eisini fyri at markera 100 ára dagin hjá Fordverksmiðjuni. Blaðið verður í framtíðini eisini at fáa í leysasølu.

Hendan útgávan er prentað í 1.600 eintøkum.

# Sama nummar sum bilurin hjá Poul

**Tá Niels Pauli Hjaltalin í Havn herfyri keypti sær ein gamlan Mercedes-Benz 190 frá 1961 úr Norra, fekk hann sær nummarplátuna Fø620. Sama nummar sum Mercedes bilurin sum Poul Gaard Hansen keypti í 1956**

*Magnus Gunnarsson*



*Ein góðveðursdagur í juli, Niels Pauli Hjaltalin við Mercedes Benz 190 frá 1961, við »Costa Del Sandagerð« í baksýni*

Síðan tað bleiv loyvt at keypa ynskinummarplátur til bilar og onnur akfør, hava vit lagt til merkis, at tey sum t.d. innflyta sær ein gamlan bil ofta fáa sær eina nummarplátu, sum passar til aldurin á bilinum. Soleiðis var tá Niels Pauli Hjaltalin í Havn herfyri keypti sær ein sera væl hildnan Mercedes-Benz 190 úr Norra.

Hann hevði sæð myndir av bilinum sum Poul Gaard Hansen í Havn keypti sum hýruvogn í 1956. Hóast bilurin hjá Niels Paula er frá 1961, eru bert smávegis broytingar farnar fram við modellinum. Bilurin hjá Niels Paula er myrkabláur eins og tann hjá Poul frá 1956.

Poul Gaard Hansen var við til at stovna bilstøðina BIL fyrst í 50-unum og var fyrsti formaður í Bilstjórafelagnum Samfylking, sum bleiv stovnað í 1957. Í 1956 keypti hann sær ein Mercedes-Benz hýruvogn frá Mercedes umboðsmanninum í Havn, Gunnar Hansen. Bilurin kostaði 18.000 krónur og fekk nummarplátuna Fø 620.

Hetta var ikki ein bíligur bilur tá.

Nakrar av orsøkunum til at Bilstjórafelagið Samfylking bleiv stovnað í 1957, vóru m. a. at takstirnir fyri hýruvognskoyring høvdu staðið í stað síðan stutt eftir kríggið, hóast bilprísirnir, tryggingargjøldini og bensinprísirnir vóru farin nógv upp. Eisini vóru vegirnir so út av lagi vánaligir og fóru illa við bilunum. Umframt at koyra hýruvogn arbeiddi Poul Gaard Hansen eina tíð hjá Mercedes umboðsmanninum Gunnar Hansen í Lucas Debesargøtu.

Tá Gunnar Hansen andaðist í 1968, helt konan, Annbritt Hansen, fram við heilsøluni og Poul Gaard Hansen, kom aftur í starv har, og arbeiddi hann har, til hann fór frá fyri aldur.

Niels Pauli Hjaltalin hevur altíð havt stóran áhuga í bilum. Pápi hansara, Dagbjartur Hjaltalin, koyrdi eisini á bilstøðini BIL fyrst í 50-unum. Niels Pauli er ein sera virkin maður, hann hevur m. a. arbeitt sum lastbilaførari, koyrt í Auto við egnum bili og sum avloysari. Saman við tvíburabróður sínum Steindor hevði hann frá 1977-1985 entreprenørfyritøkuna N. P. & S. Hjaltalin. Síðan tá hevur hann arbeitt sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Vit síggja hann m. a. byggja hús, koyra hýruvogn ella býbuss.


*Innan er hann eisini vakur. Leggið til merkis trælædningin á instrumentbrettinum og ringin í róðrinum*



*Hetta er ein sera snøggur og væl hildin bilur, sum Niels Pauli hevur fingið fatur á*



*Poul Gaard Hansen í Havn átti ein nett sama slag bilin, sumhendan Mercedes 190 hjá Niels Paula Hjaltalin. Tann hjá Poul var tó frá 1956. Niels Pauli hevur fingið somu nummarplátu, sum Poul hevði*